## Givnir at fiska tosk



Hesa ársins tíð er væl av toski at fáa fram við Lofoten í Noregi. Soleiðis er eisini í ár, men munurin er tó tann, at í ár liggja bátarnir við bryggju, meðan toskurin svimur uttanfyri. Orsøkin er, at skipa- og báteigararnir hava fingið at vita frá fiskakeyparunum, at tað er frægast at geva toskinum frið, tí tað ber ikki til at selja hann kortini. Norsk bløð skriva, at nógvir fiskakeyparar torsa ikki at keypa tosk til at salta ella at turka, tí teir bera ótta fyri, at teir fáa ikki keypsprísin innaftur, tá marknaðurin aftur fer at keypa tosk. Fleiri fiskavirkir í Noregi hava koyrt fólk til hús, og einstøk eru farin í gjaldssteðg.

## 12 ferðsluóhapp

Nógv hálka var um vikuskiftið, og tað var høvuðsorsøkin til, at 11 bilar vóru úti fyri ferðsluóhappum. Ongin álvarsamur skaði var, hóast tað tvær ferðir vóru boð eftir alarmsentralinum. Eisini vóru tveir seyðir árendir. Hetta hevur bara við sær, at bóndin verður fráboðaður. Ein ambulansi var eisini sendur niðan á Oyggjarvegin, har ein fekk skaða á sleðu. Viðkomandi hevði fingið ilt í ryggin. – Hetta er ein nakað óvanligur tilburður, sum bara hendur um veturin, vísir vakthavandi á politistøðini í Havn á.

# Skjótt er alt bara minnir



*Skjótt standa hesi húsini tóm. Í 125 ár hevur skúlagongd verið í hesum húsunum við Gjógv, men um fýra letur skúlin ikki uppaftur, tí tá er seinasti næmingurin farin úr skúlanum. Hinumegin vegin, stendur útivesið, ið hevur verið nýtt í nógv ár*

**Stutt eftir kríggið var ætlanin at byggja nýggjan skúla við Gjógv, tí tann húsini vóru blivin ov trong. Ætlanin var tó av ongum, og um fýra ár stendur skúlin tómur**

SKÚLAMÁL

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Uttantil eru húsini sum eini vanlig, gomul sethús. Ikki tað tú vanliga setur í samband við ein skúla. Tá vit trína inn gjøgnum dyrnar, angar tað av nýggjum viði, hóast húsini eru 126 ára gomul, bygd í 1883.

- Skúlin hvørvur av sær sjálvum, og tí hugsa vit ikki so nógv um alt hatta við samanleggingum og so framvegis, sigur Poul Johannes Johannesen, sum henda dagin hevur støddfrøði við næmingunum.

Eg og myndamaðurin eru farnir til Gjáar, har vit gera eina skjóta, ófráboðaða vitjan í skúlanum, vitandi um at ymiskar moderniseringar verða gjørdar í skúlanum í bygdini.

Innkomnir renna vit okkum fyrst í eina vatnautomat, og síggja beint framm í eitt rúm, ið so smáliga líkist einum vesi. Menn úr Sunda Kommunu eru nevnliga í holt við at byggja eitt rúm til vesi inni í gongini. Áðrenn var neyðugt at renna tvørtur um vegin, hevði tú eitt ørindi á vesinum, og tí er hetta helst ein kærkomin íløga til gjáarbørn, kanska serliga nú tá kalt er um allar geilar.

Tey eru tó ikki so nógv í tali longur. Vit trína innar í einastu stovuna í skúlanum, og innanfyri situr ein lærari, Poul Johannes, og tríggir næmingar, Ólavur í 4. flokki, Ebba í 5. flokki og Jacobina í 7. flokki. Stovan er lág, hugnalig og fylt við allari útgerð, ið tørvur er á í einum skúla í dag. Fjølritari, printari, teldur, køliskáp og keyboard, fyri bert at nevna nøkur.

Vesið er tó ikki einasta íløgan, ið er gjørd har. Eisini er hitapumpa komin upp. Hon sum skal avloysa gamla oljufýrið á loftinum. Hóast tey eru fá í skúlanum, skulu umstøðurnar vera í lagi, og tí verður henda íløgan gjørd.



*Næmingarnir í Gjáar skúla, saman við Poul Johannes, ið undirvísir teimum einaferð um vikuna. F.v.: Ebba, Jacobina, Ólavur og Poul Johannes*

### Skúlin hvørvur av sær sjálvum

Ólavur, Ebba og Jacobina eru einastu bygdarbørnini í skúlaaldri, og Ólavur er harafturat yngsti maður í bygdini.

Vanliga er tað Jan Thomsen, einalærari, ið undirvísir har, men ein dag um vikuna rættir Poul Johannes, ið nú er farin um pensjónsaldur, eina hjálpandi hond.

Síðani 1883 hevur skúli verið í bygdini á hvørjum ári, tó undantikið 1994-95, tá ein árgangur datt ímillum. Stutt eftir kríggið var ætlanin at byggja nýggjan skúla, tí hesin var ov lítil. Tá búðu út við 300 fólk í bygdini. Í dag eru tey kanska 30 fólk fastbúgvandi og væl fleiri um summarið.

Eingi smábørn eru í bygdini longur, og ongi útlit eru fyri fleiri heldur. Tá Ólavur verður liðugur í 7. flokki um knapt hálvtfjóðra ár, fer skúlin við Gjógv í søguna, og tá verður alt bara minnir.